Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 24. desember 2004



**Málið er Mali** (SVF)
Thurid og Snorri Brend fylgdu einum kalli, sum í 2001 leiddu tey til fjarskotna muslimska landið Mali. Kallið at boða kristna boðskapin í vesturafrikanska landinum førdi tey og børnini inn í ein heilt annan heim. Mali er eitt tað fátækasta landið í heiminum, har fólkið hvørki hevur streym, rennandi vatn ella telefon.
**Jóladagur 25. kl. 20.00**



**Jólagidd 24** (SVF)
Í Jólagidd nr. 24 verður alt við, sum kann - og meira afturat. Tí jólaaftan skal alt vera so, sum tað eigur at vera. Og tað vil siga, at finalan í Karaóki-kappingini verður á skránni, seinasta leikasøgan verður lisin, spæld og víst. Lív fær eisini nógvar gestir stórar og smáar, ungar og heilt ungar, bæði í sinn og skinn. Og mangt, mangt annað er á skránni.
**Jólaaftan 24. kl. 16.00**

**Sangfuglurin frá Blue Valley** (Kanal 5)
Leanna Taylor (Dolly Parton) er country- og western-sangarinna og stríðist fyri at koma fram í tónleikavinnuni. Sum tanáringur rýmdi hon heimanífrá fyri at sleppa undan sínum harðliga pápa og fyri at leita eftir eydnuni í tónleikabýnum Nashville. Men fleiri ár seinni er Leanna ikki vorðin kend, hóast hon avgjørt hevur evnini. Amerikanskt drama frá 1999.
**Mikudag 29. kl. 14.00**


Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**